Bilar

Nr. 70 • hósdagur • 14. apríl 2005 • 79. árg.

### VW Passat FSI Trendline

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur 4 syl. FSI (bensin) 150 hk | Eginvekt | 1375-1475 kg |
| 0-100 km/t | 9,4 sek. | Viðførisrúm | 565 litrar |
| Bensinnýtsla | 12,1 km/l | Prísur | kr. 298.000,- (2,0 FSI Trendline) |
| Dekkstødd | 205/55-16 | Søluumboð | Bilasølan v.Øssur Johannesen |
| Stødd og vekt | | | Vegurin Langi |
| Longd | 476,5 cm | | FO-188 Hoyvík |
| Breidd | 182,0 cm | | Tel. 315354 |
| Hædd | 147,2 cm | | www.bilasolan.fo |

# Nýggjur VW Passat og opið hús




*Øssur Johannesen, stjóri (v.m.), og Fróði Clementsen, sølumaður, við tveimum nýggjum VW Passat*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Nýggi VW Passat, ið vit herfyri royndarkoyrdu í Barcelona í Spania, er nú komin til landið. Í hesum sambandi verður opið hús á Bilasøluni v. Øssur Johannesen í Hoyvík leygardagin 16. apríl**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað er ikki á hvørjum degi at ein heilt nýggjur VW Passat kemur á marknaðin. Forgangarin kom fyrstu ferð á marknaðin í 1996 og var sostatt á marknaðinum í umleið nýggju ár.

VW Passat er nú vorðin ein størri og rúmligari bilur enn forgangarin. Hann er longri, breiðari og hægri, bæði hvat viðvíkur plássinum í kabinuni og í viðførisrúminum, ið nú er tað størsta í sínum klassa við 565 litrum. Serliga tað at bilurin er breiðari er eitt tað fyrsta ein leggur til merkis.

Kabinan er væl innrættað, og forsetrini stuðla væl og eru løtt at stilla inn til røttu koyristøðuna. Nakkapúturnar eru aktivar, so tær verja móti koyrsilsbresti.

Koyrieginleikarnir eru á sera høgum støði, og elektromekaniska servostýringin saman við framkomna undirvogninum ger sítt til, at bilurin er ein uppliving at koyra.

Hondbremsan er avloyst av eini elektroniskari parkeringsbremsu, sum verður aktiverað við einum knøtti til vinstru á instrumentborðinum. Bremsan slær automatiskt frá, tá bilførarin traðkar á koblingspedalin og startar bilinum, setur í gir og aktiverar spitaran. Treytin er tó, at bilførarin er bundin í trygdarbeltið, og hann hevur latið hurðina aftur eftir sær. Startlykilin er avloystur av eini "diskett", sum verður sett í start/stopp lyklarholið.

### Reinsar bremsuskivurnar

Sum nakað heilt nýtt hevur Passat eina trygdarskipan, sum ger at tá tað sirmar ella regnar, og viskararnir eru aktivir, flyta bremsuklossarnir seg við jøvnum millumbili inn móti bremsuskivuni, fyri at reinsa tað vatnið burtur, ið kann seta seg á bremsuskivurnar. Hetta styttir munandi um bremsulongdina í vátveðri.

Passat fæst í útgávunum Trendline, Comfortline, Sportline og Highline. Í standardútgávuni er bilurin útgjørdur við t.d. fartpiloti, fjarstýrdum sentrallási, elrútum, síðuspeglum við hita, 16" hjólum, radio v.fløguspælara, Climatic aircondition, og ESP (Elektronic Stabilitet Program) sum hjálpir um bilurin glíður út í svingum.

Í fyrstu atløgu sær motorskráin sær soleiðis út. Bensinmotorar: 1,6 litur FSI við 115 hk, og 2,0 litur FSI við 150 hk. Dieselmotorar: 1,9 litur TDI við 105 hk, 2,0 litur TDI við 140 hk. Seinni koma fleiri aðrar útgávur og aðrir motorar, sum t.d. 2,0 FSI turbo við 200 hk, 3,2 litur V6 4-Motion við 250 hk, og 2,0 TDI við 170 hk.

Í sambandi við at nýggi Passat er komin, verður opið hús hjá Bilasøluni v. Øssur Johannesen leygardagin 16 apríl, har hǿvi verður at síggja og royndа bilin.

## Metár hjá Lamborghini



2004 varð eitt metár hjá italsku Lamborghini bilverksmiðjuni. Seldir vóru 22 prosent fleiri bilar, tilsamans 1592 í mun til árið fyri. 41 prosent av bilunum vórðu seldir í USA og einans 5 prosent á italska heimamarknaðinum

*Kelda: Motor Magasinet*

## Daimler-Chrysler



Chrysler høvdu í fjør sítt besta ár síðan 1999 við einum yvirskoti upp á 10,6 milliardir krónur, og Mercedes høvdu eitt yvirskot upp á 12,8 milliardir krónur í mun til 21, milliardir krónur árið fyri

*Kelda: Motor Magasinet*

## GM og Cadillac



General Motors hava ætlanir um at niðurleggja framleiðsluna av Cadillac á nøkrum bilverksmiðjum í USA orsakað av vantandi ordrum

*Kelda: Motor Magasinet*